## Skulu hava góðan fisk

Tá tað norska matvørueftirlitið herfyri kannaði fiskin, sum fiskahandlarnir seldu sum feskan fisk, vísti tað seg, at tað so sum so við feskleikanum og góðskuni. Samstundis vísti ein spurnarkanning, at nógv fólk aftraðu seg við at keypa fiskin, tí tey høvdu ikki álit á, at hann veruliga var feskur. Men nú hevur Helga Pedersen, fiskimálaráðharri, sett sær fyri at fáa skil á hesum. Eitt uppskot um at seta veiðidag og seinasta søludag á fisk er farið til hoyringar.



## Eingin flúgving

Tað var rættiliga nógvur vindur um tað mesta av Íslandi í gjár, og onkur húsatekja fór. Tá veðurmenninir eharafturat boðaðu frá óstøðugum viðurskiftum í luftini, gjørdu flogfeløgini av at avlýsa alla innanlandsflúgving í gjár. Í tí nógva vindinum vóru eisini boð eftir bjargingartænastuni, tí eitt skip við motorskaða rak ímóti landi nærhendis Ísafirði. Tað eydnaðist at fáa skipið og teir átta menninar umborð til lands í øllum góðum.

# Eg helt tað vera skemt



*Tað er ógvuliga harmiligt, at Heðin Mortensen og meirilutin í Tórshavnar Býráð ætla at økja útreiðslurnar so nógv, at tað næsta ár verður neyðugt hjá Tórshavnar Kommunu at taka stórt lán, akkurát, sum vit eru blivin skuldarfrí, sigur gamli borgarstjórin, Jan Christiansen*

**- Næsta ár fer Tórshavnar Býráð at hava eitt hall upp á yvir 150 milliónir og fíggjarpolitikkurin hjá meirilutanum í Tórshavnar Býráð er so ábyrgdarleysur, at hetta vilja vit ikki leggja navn til, sigur fyrrverandi borgarstjórin, sum nú er í andstøðu**

FÍGGJARÆTLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Í fyrstuni helt eg, at tað var skemt.

Jan Christiansen, býráðslimur í Havn, trúði ikki sínum egnu eygum, tá ið hann sá uppleggið hjá meirilutanum í býráðnum til fíggjarætlanina hjá kommununi fyri næsta ár.

Fyrrverandi borgarstjórin, sum nú er í andstøðu í býráðnum, sigur, at fíggjarpolitikkurin hjá samgonguni er so ábyrgdarleysur, at hetta kann ikki takast sum annað enn skilaleyst valagn.

Tí tók minnilutin tað óvanliga stig á býráðsfundinum í Havn í gjárkvøldi, at krevja tað ført í gerðabókina, at minnilutin hevði als onki havt við uppskotið at gera.

### Umsitingin rýkur upp

Tað eru fleiri viðurskifti, sum leypa í eyguni á fyrrverandi borgarstjóranum.

- Tað fyrsta, vit leggja til merkis, er, at umsitingin hjá Tórshavnar Býráð skal vera heili 20% dýrari næsta ár, enn hon er í ár. Sostatt skal játtanin til umsiting hækka úr 48 milliónir, upp í 58 milliónir, ella heilar 10 milliónir.

Hann heldur, at hetta man vera størsta hækking í søguni, tí undanfarin býráð hava altíð sæð eina dygd í at hava eina lítla umsiting.

Hann hevur eisini lagt til merkis, at næsta ár skal Tórshavnar Kommuna tilsamans dýrka heilar 54 milliónir, bara í sjálvum rakstrinum.

- So nógv er raksturin ongantíð hækkaður upp á eitt ár, staðfestir hann.

Hann vísir á, at eitt nú er ætlanin at seta heilar 46 milliónir av á sjálvum rakstrinum til at umvæla kommunalar bygningar.

- Hetta er meiri enn fíggjarætlanin hjá eini miðal kommunu og tað ætlar meirilutin í Havn at brúka til umvælingar. Tí er hetta ikki ein játtan, sum hoyra heima í rakstrinum, men eigur at verða sett undir íløgurnar.

### Ongan livandi møguleika

Men tað, sum ørkymlar hann einamest, er, hvussu stórar íløgur ætlanin er at gera næsta ár.

- Í ár eru 155 milliónir settar av til íløgur, men higartil hava vit bert klára at arbeitt fyri 80 milliónir.

Kortini er ætlanin at seta heilar 256 milliónir av til íløgur næsta ár og tað er 101 milliónir meiri enn í ár. Leggja vit tær 70 milliónirnar afturat, sum koma at hanga eftir frá í ár, skulu vit gera íløgur fyri yvir 300 milliónir næsta ár.

- Tað er fullkomiliga veruleikafjart, staðfestir Jan Christiansen.

Tilsamans fer Tórshavnar Kommuna sostatt at kosta 742 milliónir at reka næsta ár, tá ið útbyggingar eru taldar við.

Í ár er fíggjarætlanin 590 milliónir. Sostatt er talan um eina hækking upp á 152 milliónir.

### Mugu taka stórt lán

Jan Christiansen sigur, at eftir tí, hann hevur fingið upplýst frá umsitingini hjá býráðnum, fer inntøkan hjá kommununi at vera 600 milliónir næsta ár.

- Sostatt verður neyðugt at fíggja góðar 150 milliónir. Eitt sindur kann helst takast av innistandandi hjá kommununi, men tað mesta verður neyðugt at læna.

Jan Christiansen heldur, at hetta er serstakliga harmiligur og ábyrgdarleysur fíggjarpolitikkur, tí undanfarin býráð hava lagt doyðin á at betala skuldina niður og nú er Tórshavnar Kommuna skuldarfrí, so at rentuútreiðslurnar kunnu minkast, so at peningurin kann brúkast til íløgur ístaðin.

- Tí er ógvuliga hugstoytt, at sitandi meiriluti førir ein so ábyrgdarleysan fíggjarpolitikk, at tað verður neyðugt at taka stórt lán, sigur hann.

### Ongin virðing

Men nú ætlar meirilutin at veita ymsar tænastur fyri pengarnar. Eitt nú skulu byggjast skúlar, stovnspláss til eldri og verkløg til ítrótt. Samstundis er ætlanin at gera tað lættari hjá barnafamiljum og busskoyringin verður framvegis ókeypis.

- At vit ikki hava frætt um nakrar sum helst ætlanir fyrrenn nú, Sosialurin fortelur okkum tað, sigur alt um, hvussu lítla virðing, meirilutin í býráðnum hevur fyri okkum í minnilutanum, sigur Jan Christiansen.

Hann staðfestir, at sjálvandi er tað gott, at byggja út og at veita borgarum tænastur.

- Men vit mugu ikki gloyma, at onki er ókeypis. Skal tað verða ókeypis hjá teimum, sum koyra buss, merkir tað bara, at allir skattaborgarar skulu betala. Og verður tað bíligari at hava børn í ansing, merkir tað bara, at allir skattaborgarar skulu betala so mikið meiri.

- Eitt er at byggja samfelagið út, men tað er neyðugt at gera tað við skili og at raðfesta. Vandin við einum so ábyrgdarleysum fíggjarpolitikki, sum meirilutin førir, er, at tað bindur fleiri býráð og fleiri ættarlið fram í tíðina og skuldi tað hent, at stígur kemur í búskapin, verður tað eitt komandi býráð, sum skal undir tað pínufulla upptakið, at skerja tænasturnar aftur, tí vit vita, at tað er ómetaliga torført at lækka ein rakstrarkostnað aftur og at taka tænastur aftur frá borgarum, sum teir hava fingið.

- Tí er fíggjarpolitikkurin hjá meirilutanum so ótrúliga ábyrgdarleysur, sigur Jan Christiansen.

Hann sigur, at avleiðingin av hesum er, at enn meiri ferð verður sett á búskapin og tað fer at elva til stórar príshækkingar, sum fer at raka vanliga fólkið harðast.

- Tað er harmiligt, at landsins størsta komma føra ein politikk, sum setir enn meiri ferð á búskapin.

Hann sigur, at vanliga hevur Tórshavnar Kommuna gjørt íløgur fyri 100 milliónir um árið og Tórshavnar Havn hevur gjørt íløgur fyri 50 milliónir.

-Tað hevur verið hóskandi, tí hvørki fólkatal ella barnatal veksur nakað serligt, sigur gamli borgarstjórin.